# mentanarVIKAN

Í RUNAVÍKAR KOMMUNU

## 2022

24. APRÍL–1. MAI





# KVØÐA FRÁ BORGARSTJÓRANUM

## VIT ERU MÁLIÐ

Vit eru føroyingar serstøk tjóð við felags lagnu eitt felags-blóð og felags minni so mong tú finnur úr tíðarflóð. Úr hesi strofuni hjá Hargarskaldinum sløðast mál- og mentanar-ligir togendar og teymar í allar ættir. Eisini í teimum 15 bygdunum í Runavíkar kommunu, sum í stóran mun hava gróðursett og ment sína egnu mentan og málbrigdi, sum líkjast frá, hóast málið – móðurmálið – er eitt og tað sama.

Menniskju hava sum allar aðrar livandi verur tørv á breyði fyri at hóra undan kropsliga, - hetta er holdliga undirs-tøðan. Stórviðurin er kortini vitið, sum vit í skapanini fingu framíhjá. Úr forstandinum kom málið og mentanin, sum eru sprottin úr gerandisdegnum hjá hvørjum einstakum og úr kollektivu bráðpannu fólksins. Úr hesi bræðingini gjørdust vit tey vit eru – ein serstøk tjóð í heimsins áleikandi meldri.

Onkuntíð ræður um at steðga á, eisini í staðbundnum høpi, fyri at hyggja inn í okkum sjálvi og snúgva spegilinum frá okkum, soleiðis, at bæði vit og onnur kunnu fáa høvi til at síggja ein úrdrátt úr øllum meinginum skapt á tíðarflóðini.



Til tað er mentanarvikan ætlað, sum aftur í ár er sett á skrá í Runavíkar kommunu. Móðurmálið hevur aftur fingið høga raðfesting saman við øðrum munadyggum andaligum og mentanarligum vitaminum. Málið og mentanin hanga treytaleyst saman. Vit eru málið, og málið eru vit, í breiðastu merking.

Mátti vikan verið okkum øllum til holla stimbran og gevandi kveiking.

Vælkomin

*Tórbjørn Jacobsen, borgarstjóri.*

# SETAN

BROT ÚR SKRÁNNI

## - ALLIR VEGIR FØRA TIL GULU SMIÐJU!

Runavíkar kommuna bjóðar øllum at verða hjartaliga vælkomin til setanina, sum í ár verður í Gulu Smiðju. Eyðkendi guli smiðjubygningurin er nýggja ungdóms- og virkishúsið í kommununi. Umframt hugnaliga og mennandi samveru, so er ætlanin, at húsið skal nýtast til fjølbroytt mentanarligt virksemi, og verður Gula Smiðja eftir ætlan klekingardepil fyri mentan millum ung á staðnum.

Tann 24. apríl letur Gula Smiðja hurðarnar upp fyri almenninginum.

Sum vanligt bjóða Rynkurnar og Roysnið øllum at fylgjast til setanina. Tað verður súkklað ella runnið frá hvør sínum heraðshorni – og øll enda í Gulu Smiðju.

Á skránni verða tónleikur, røða og okkurt gott undir góman.

**Byrjað verður kl. 14:00**

Vit síggjast!

Ókeypis

SUNNUDAG 24. APRÍL KL. 14 SALTANGARÁ

## RENN VIÐ ROYSNINUM TIL SETANINA:

Øll møta Niðri á Støð í Lamba kl. 13.20 og renna til Gulu Smiðju.

SUNNUDAG 24. APRÍL KL. 13.20 LAMBA





# SÚKKLA ELLA RENN TIL SETANINA

## Renn við Roysninum ella súkkla við Rynkeby

Til ber at súkkla ein langan tein av bygd til Gulu Smiðju í Saltangará, ella tú velur tær ein styttri tein. Hygg í yvirlitið niðanfyri, so sært tú, hvar Rynkurnar verða nær.

## Vit hittast her:

| | |
|---|---|
| Funningur – við gl. skúlan | kl. 11:00 |
| Elduvík – við skúlan: | kl. 11:00 |
| Funningsfjørður – við skúlan: | kl. 11.30 |
| Oyndarfjørður – við skúlan: | kl. 11:00 |
| Skála – við skúlan: | kl. 12:00 |

**Í SKÁLAFIRÐI við Effo:** SAVNINGARSTAÐUR **kl. 12:30**

| | |
|---|---|
| Søldarfjørður – við barnagarðin: | kl. 13:00 |
| Lambareiði – á eiðinum: | kl. 13:20 |
| Æðuvík | kl. 12:30 |
| — Súkkla til Glyvra skúla | |
| Rituvík | kl. 12:45 |
| — Súkkla til Glyvra skúla | |

**GLYVRA SKÚLI:** SAVNINGASTAÐUR **KL. 13:40**

Øll súkkla til Glyvra skúla og síðan verður súkklað saman til GULU SMIÐJU har **SETANIN VERÐUR KL. 14.00**



BROT ÚR SKRÁNNI




Ókeypis

SUNNUDAGIN 24. APRÍL KL. 14:00

SALTANGARÁ

# FLAGGDAGSHALD Í RUNAVÍK OG Á SKÁLA

## RUNAVÍK

Flaggdagshaldið verður uttan fyri Skótahúsið við Løkin 25. apríl kl. 16:00 (Um ikki viðrar, verður farið inn í Skótahúsið)

Ítróttarfeløg og skótar verða biðin um at møta kl. 15:30 við Skúlan við Løkin.

Skótar og ítróttarfeløg ganga skrúðgongu, og Nes Sóknar Musikkfelag spælir. Tórbjørn Jacobsen, borgarstjóri, býður vælkomin. Síðan heldur Brynhild Thomsen, flaggdagsrøðuna.

Aftaná verður drekkamuður í skótahúsinum, og høvi verður at spæla kondibingo, sum skótarnir skipa fyri.

MÁNADAGIN 25. APRÍL KL. 16:00

SKÓTAHÚSIÐ VIÐ LØKIN, RUNAVÍK

## SKÁLA

Skipað verður fyri flaggdagshaldi við Kahyttina við bátahylin á Skála 25. apríl kl. 16:30.

Sára Mrdalo býður vælkomin, og Sanna Klein heldur flaggdagsrøðu.

6. flokkur á Skála skúla skipar fyri kondibingo, og høvi verður at keypa vaflur og kaffi/te/sunkist.

MÁNADAGIN 25. APRÍL KL. 16:30

KAHYTTIN Á SKÁLA

Ókeypis

BROT ÚR SKRÁNNI







# TRÓNDARSVIMJING

BROT ÚR SKRÁNNI

## Svim um Fjørðin – Flot skipar fyri svimjing um fjørðin av Skála til Skipanes.

Dugir tú væl at svimja og ert tú yvir 13 ár? Kom so og svim um fjørðin!

Svomið verður av Skála og inn í bátahylin á Skipanesi.
Teinurin er einar 1,2 -1,3 km langur.

Meðan svomið verður, fylgja skjóttgangandi bátar frá bjargingarfelagnum svimjarunum at tryggja, at teir koma trygt fram. Tiltakið er ókeypis og endar Niðri á Støð á Glyvrum har m.a. súpan verður at fáa.

Skift verður á Skála áðrenn, og kl. 10.45 verða allir svimjarar koyrdir oman til startin. Bussur koyrir klæðini til neystið hjá kapp-róðrarfelagnum Niðri á Støð á Glyvrum, har til ber at lata seg í aftur.

**ALDURSMARK:** 13 ár. (Duga væl at svimja).

**KRAV:** Vátdrakt helst 5-6 mm tjúkk, hettu, handskar og skógvar.

**GEVIÐ GÆTUR:** Svimjifelagið Flot skaffar nakrar fylgibátar, men vit heita á øll tilmeldaði, um at skaffa egnan fylgibát at hava við sær á túrinum um fjørðin.

**Tilmelding** hjá forkvinnuni í Flot Heidi Jacobsen, tlf. 228 537 ella á flotsvimjifelagid@gmail.com. Viðmerk navn og tlf.nr. umframt navn og tlf. nr. á einum avvarðandi og møguliga ein fylgibát. **Seinasta freist at melda til er 15. apríl.**

LEYGARDAGIN 30. APRÍL KL. 11:00

AKKERSVÍK, SKÁLA

Ókeypis










# FELAGS MORGUNMATUR Á SKÁLA

Runavíkar kommuna bjóðar øllum borgarum til felags morgunmat í ítróttarhøllini á Skála leygarmorgun frá **kl. 9-11**. Tórbjørn Jacobsen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin og síðani syngur Skálafjarðar sløkkiliðskór. Aftaná verður skemtiligt undirhald til børn og barnsligar sálir, tá Angela og Hannibal fara á pall.

**Skrá**

**9:00** Dyrnar lata upp

**9:15** Tórbjørn Jacobsen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin

**9:30** Skálafjarðar sløkkilið syngur

**10:00** Barnaundirhald við Angelu og Hannibal

*Hjartaliga vælkomin!*

LEYGARDAGIN 30. APRÍL KL. 09:00-11:00

ÍTÓTTARHØLLIN Á SKÁLA

Ókeypis

● = Ókeypis

# SKRÁIN

## SUNNUDAGUR 24. APRÍL

**Kl. 10:00–14:00** **Brunsj hjá Karhild**
Æðuvík

**14:00-16:00** ● **Mentanarvikan í Runavíkar kommunu verður sett.** Sí s. 3.
Gula Smiðja, Saltangará

**14:00-18:00** ● **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940**
Funningur

**15:00** ● **Gongutúrur úr Funningsfirði til Elduvíkar**
Byrjað verður við bátahylin í Funningsfirði
Ferðaleiðari er Jógvan K. Hendriksson.

**15:00-17:00** **Afternoon tea hjá Karhild**
Æðuvík

**15:00-19:00** **Urtahavin hevur støkk upp café**
Heiðavegur 13, Saltangará

**15:00–21:00** ● **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni**
Heiðavegur 32, Saltangará

**16:00-17:00** ● **Fernisering v/ Hansinu Iversen og kórið Tarira framførir** Glyvra kirkju

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdarsavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:00-20:00** ● **Jørgin Olsen hevur málningaframsýning**
í Bátafelagnum á Bakka, Niðri á Støð, Glyvrar

**17:00-19:00** ● **Fernisering av framsýningini Óli P. teknar**
Kahyttin við bátahylin, Skála – ein framsýning av útvaldum tekningum hjá Óla P. Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrisson spæla nøkur løg.

**19:30-21:00** ● **Rithøvundaprát og upplestur við Rannvá H. Mortensen og Lív Mariu Róadóttir Jæger**
Bókasavnið við Løkin, Runavík

## MÁNADAGUR 25. APRÍL

**Kl. 14:00** ● **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-18:00** ● **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940**
Funningur

**15:00-21:00** ● **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni**
Heiðavegur 32, Saltangará

**15:00-19:00** **Urtahavin hevur støkk upp café**
Heiðavegur 13, Saltangará

**16:00-17:00** ● **Flaggdagshald í Runavík, Brynhild Thomsen heldur røðu**
Skótahúsið við Løkin

**16:00-18:00** ● **Óli P. teknar** Kahyttin við Bátahylin, Skála
– framsýning av útvaldum tekningum hjá Óla P.

**16:00-18:00** ● **Hansina Iversen sýnir fram listaverk**
Glyvra kirkju

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:30-17:30** ● **Flaggdagshald á Skála** Kahyttin, Skála
Sanna Klein heldur røðu

**17:00-** **Kondibingo á Skála** Kahyttin, Skála

**17:00-18:00** ● **Fernisering við Edith Mørkøre** Bókasavnið við Løkin, Runavík Hon greiðir frá framsýningini og prenthættinum ísv náttúruprent

**18:00-20:00** ● **Jørgin Olsen hevur málningaframsýning**
í Bátafelagnum á Bakka, Niðri á Støð, Glyvrar

**19:00** **Heimablídni í Víkhúsunum**
Víkhúsið, Oyndarfjørður
Døgurði og ábit, við í prísinum er rundvísing og søgufrágreiðing. Tilmelding fer fram á tlf. nr. 50 44 19 ella vikhusini1856@gmail.com seinast 2 dagar áðrenn.

**19:30-20:30** • **Vinnararnir av ársins skrivikapping verða kunngjørdir.** Lena Andersen framførir

## TÝSDAGUR 26. APRÍL

**Kl. 11:00-14:00** **NÁTTÚRUPRENT** Skúlin við Løkin í handverkara- og listastovuni, Runavík
— Verkstova við Edith Mørkøre. Vaksin 15 ár + Tilmelding krevst á litbrigdi.net

**13:00-18:00** • **Edith Mørkøre sýnir fram náttúruprent úr føroysku náttúruni**
Bókasavnið við Løkin, Runavík

**14:00** • **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-18:00** • **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940**
Funningur

**15:00-21:00** • **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni**
Heiðavegur 32 Saltangará

**15:00-19:00** **Urtahavin hevur støkk upp café**
Heiðavegur 13, Saltangará

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar — ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:00-18:00** • **Hansina Iversen sýnir fram listaverk**
Glyvra kirkju

**16:00-19.00** **Náttúruprent** Skúlin við Løkin í handverkara- og listastovuni, Runavík
— Verkstova við Edith Mørkøre. Børn og vaksin. Tilmelding krevst á litbrigdi.net

**19:00-20:30** **Kvøldseta í Fornminnafelagshúsinum á Skála** Skála — Tórbjørn Jacobsen, borgarstjóri heldur fyrilestur undir heitinum: *Eg sjólívið valdi*

**19:00** • **Føroya Landsorkestur og Eysturoyar Symfoniorkestur spæla** Løkshøll, Runavík

**19:30-21.00** • **Konsert við HORRSE** Gula Smiðja
Musikkskúlanæmingar spæla aftaná.

**19:30** **Bindiskeið v/ Sáru Mrdalo** Æðuvík
Tilmelding á tel. 21 92 81.

## MIKUDAGUR 27. APRÍL

**Kl. 10:00-11:00** • **Felags morgunsangur og sangløta** Skála skúli

**10:00-11:00** • **Felags morgunsangur** Stóri salur, Oyndarfjarðar skúli

**12:00-18:00** • **Elsabech hevur støkk upp handil**
Heiðavegur 38, Saltangará

**13:00-18:00** • **Edith Mørkøre sýnir fram verk úr føroysku náttúruni**
Bókasavnið við Løkin, Runavík

**14:00** • **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-18:00** • **Endurnýtslucafé í Skála skúla** Skála skúli
— peningurin fer óskerdur til Reyða kross

**14:00-18:00** • **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940**
Funningur

**15:00-21:00** • **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni**
Heiðavegur 32 Saltangará

**15:00-19:00** **Urtahavin hevur støkk upp café**
Heiðavegur 13, Saltangará

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:00-18:00** • **Hansina Iversen sýnir fram listaverk**
Glyvra kirkju

**16:00-18:00** • **Óli P. teknar** Kahyttin við bátahylin, Skála
– framsýning av útvaldum tekningum hjá Óla P.

**17:30-20:30** **Klassisk tekning** Frítíðarskúlin við Stórá í Rituvík
– Barbara Hilduberg skipar fyri tekniskeiði.
Tekna teg á barbarahilduberg@gmail.com.

**19:00** **Heimablídni í Víkhúsunum.**
Víkhúsið, Oyndarfjørður Døgurði og ábit, við í prísinum er rundvísing og søgufrágreiðing. Tilmelding fer fram á tlf. 50 44 19 ella vikhusini1856@gmail.com seinast 2 dagar áðrenn

**19:00-21:00** • **Vit eru málið** Løkshøll, Runavík - Orðaskifti um føroyska málið. Sí s. 21

## HÓSDAGUR 28. APRÍL

**Kl. 11.00** • **Listabussurin vitjar** Søldarfjørð (barnagarðin)

**12:00** • **Listabussurin vitjar**
Oyndarfjørð (skúlan og barnagarðin)

**12:00-18:00** • **Elsabech hevur støkk upp handil**
Heiðavegur 38, Saltangará

**13:00-18:00** • **Edith Mørkøre sýnir fram náttúruprent úr føroysku náttúruni**
Bókasavnið við Løkin, Runavík

**14:00** • **Listabussurin vitjar**
Skála (skúlan og barnagarðin)

**14:00** • **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-18:00** • **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940**
Funningur

**14.45** • **Listabussurin vitjar** Æðuvík

**15:00-21:00** • **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni**
Heiðavegur 32 Saltangará

**15:00-19:00** **Urtahavin hevur støkk upp café**
Heiðavegur 13, Saltangará

**15.30** • **Listabussurin vitjar**
Runavík (Bókasavnið við Løkin)

**16:00-18:00** • **Hansina Iversen sýnir fram listaverk**
Glyvra kirkju

**16:00-18:00** • **Óli P. teknar** Kahyttin við bátahylin, Skála
– framsýning av útvaldum tekningum hjá Óla P.

**16:00-18:45** **Dansiskúlin í høllini í** Glyvra skúla

Tilmelding við at senda eini boð til Dansiskúlan á Facebook ella á tlf. nr. 255038

| | |
|---|---|
| 15:15-15:45: | Foreldur og børn, 2-3 ár. Prinsessur og sjónrænarar |
| 16:00-16:45: | Prinsessuskúli, 4-6 ár. |
| 17:00-17:45: | Hip Hop, 7-12 ár |
| 18:00-18:45: | Ballett 30 ár + |

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16.30** • **Listabussurin vitjar** Lamba (fjósið)

**17.00** • **Listabussurin vitjar** Funningsfjørð (bygdahúsið)

**17:00-18:00** • **Opera men eingin olja** Bókasavnið við Løkin, Runavík – bókaframløga við Martini Næs

**18:00-20:00** • **Jørgin Olsen hevur málningaframsýning** í Bátafelagnum á Bakka, Niðri á Støð, Glyvrar

**19:00** • **Verkætlanir á Skála** Skála skúli
– Tummas Mekal Jacobsen greiðir frá:
1. Staðarnøvn á Skála og Skálafirði
2. Bókaútgávu fyri Skála og Skálafjørð
3. Fríøkið við Prestá
4. Fornminni á Ytra Skála

**19:00-20:00** **Strúkikvartettin Sequentia framførir tónleik eftir Haydn, Shostakovich og Sandagerði** Elduvíkar kirkja

**17:30-20:30** **Klassisk tekning** Frítíðarskúlin við Stórá í Rituvík
– Barbara Hilduberg skipar fyri tekniskeiði. Tekna teg á barbarahilduberg@gmail.com.

**19:00-20:00** **Stand-Up v/ Ari Eldjárn – eyka** Løkshøll

**21:00-22:00** **Stand-Up v/ Ari Eldjárn** Løkshøll

## FRÍGGJADAGUR 29. APRÍL

**Kl. 10:00-00.00** • **Open by Night** – handlarnir hava opið. Sí s. 18.

**10:00-00:00** • **Elsabech hevur støkk upp handil** Heiðavegur, Saltangará

**12:00-16:00** **Pop-up kafé við Leivi Ejdesgaard** Gamli skúli, Oyndarfjørður

**13:00-18:00** • **Edith Mørkøre sýnir fram náttúruprent úr føroysku náttúruni** Bókasavnið við Løkin, Runavík

**14:00** • **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-18:00** • **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940** Funningur

**15:00** • **Musikkskúlanæmingar framføra** Bókasavnið við Løkin, Runavík

**15:00-24:00** **Urtahavin hevur støkk upp café** Heiðavegur 13, Saltangará v./ tónleiki

**15:00-21:00** • **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni** Heiðavegur 32, Saltangará

**16:00-18:00** • **Óli P. teknar** Kahyttin við bátahylin, Skála
– framsýning av útvaldum tekningum hjá Óla P.

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:00-18:00** • **Hansina Iversen sýnir fram listaverk** Glyvra kirkja

**16:00-18:45** **Dansiskúlin í høllini í** Glyvra skúla

Tilmelding við at senda eini boð til Dansiskúlan á Facebook ella á tlf. nr. 255038

| | |
|---|---|
| 15:15-15:45: | Foreldur og børn, 2-3 ár. Prinsessur og sjónrænarar |
| 16:00-16:45: | Prinsessuskúli, 4-6 ár. |
| 17:00-17:45: | Hip Hop, 7-12 ár |
| 18:00-18:45: | Ballett 30 ár + |

**16:30-20:00** • **HoymaList letur upp** Rituvík
– Listafólkini sýna fram verk í Rituvík

**16:30-20:00** • **Tekningaframsýning** Rituvík
– luttakarir frá tekniskeiðnum í Rituvík

**17:00-17:30** • **Andras Mortensen** Gl. skúlanum í Funningi
– lektari hugleiðir um Føroyingasøgu

**17:30-18:30** • **Jóanes í Funningi** Gl. skúlanum í Funningi
– greiðir frá verkætlanina um Grím Kamban, og **Marjun Niclasen** hugleiðir um standmyndina í ferðavinnuhøpi

**18:30-19.00** • **Samrøða við Høgna Mohr um tíðarskeiðið í Funningi** Gl. skúlanum í Funningi

**18:00-20:00** • **Jørgin Olsen hevur málningaframsýning** í Bátafelagnum á Bakka, Niðri á Støð, Glyvrar

**19:00** **Heimablídni í Víkhúsunum** Víkhúsið, Oyndarfjørður Døgurði og ábit, við í prísinum er rundvísing og søgufrágreiðing. Tilmelding fer fram á tlf. nr. 50 44 19 ella vikhusini1856@gmail.com seinast 2 dagar áðrenn.

**21:00** **Konsert við Frændum** Løkshøll, Runavík

## LEYGARDAGUR 30. APRÍL

**Kl. 09:00-11:00** • **Kommunan bjóðar morgunmat og barnaundirhald** Ítróttarhøllin á Skála

**10:00-19:00** **Bóndagarðsdagar** Hanusarstova, Æðuvík

**10:00-17:00** • **Elsabech hevur støkk upp handil** Heiðavegur 38, Saltangará

**11:00-23:00** **Urtahavin hevur støkk upp café** Heiðavegur 13, Saltangará Dagurin byrjar við brunsj og endar við pub quiz

**13:00-18:00** • **Edith Mørkøre sýnir fram náttúruprent úr føroysku náttúruni** Bókasavnið við Løkin, Runavík

**11:00-13:00** • **Svim um fjørðin** Skála og Skipanes – Flot skipar fyri svimjing um fjørðin av Skála til Skipanes. Sí s. 6

**11:30-12:00** • **Konsert við Daniu Tausen** Rituvíkar kirkja

**12:00-16:00** • **Pop-up kafé við Leivi Ejdesgaard** Gamli skúli, Oyndarfjørður

**12:00-18:00** • **Hansina Iversen sýnir fram listaverk** Glyvra kirkja

**13:00** **Gin-yoga og sjósvimjing** Á Glyvrastrond

**13:00-17:00** **Salsa workshop** Stóri salur, skúlin í Oyndarfirði – Undirvísing á byrjanarstøði í kubanskum salsa, pardansi og rytmu. Undirvíst verður í tveir dagar, leygardag seinnapart og sunnudag seinnapart. Øll kunnu vera við, tó 16 ára aldursmark. Undirvísarar: Hanna og Ólavur Olsen. Tekna teg á olavur77@hotmail.com.

**13:00-18:00** • **HoymaList letur upp** Rituvík – Listafólk sýna fram verk í Rituvík. Sí. s. 19

**14:00** **Heimablídni í Víkhúsunum** Víkhúsið, Oyndarfjørður Afternoon tea, við í prísinum er rundvísing og søgufrágreiðing. Tilmelding fer fram á tlf. nr tlf 50 44 19 ella vikhusini1856@gmail.com seinast 2 dagar áðrenn

**14:00-18:00** • **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940** Funningur

**14:00** • **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-18:00** **Afternoon tea** Glyvralon

**14:00-17:00** • **Kirkjan í Funningi hevur opið** Funningur

**15:00-18:00** **Afternoon tea hjá Karhild** Æðuvík

**15:00-21:00** • **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni** Heiðavegur 32, Saltangará

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:00-19:00** • **Opið hús á brandstøðini á Mann**
á Skála Skálavegur 11, Skála
kl. 19:00 Skálafjarðar sløkkiliðskór syngur.

**16:00-16:40** • **Konsert v/ Guðrið Hansdóttir í Funnings kirkju** Funningur

**17:00-20:00** • **Jørgin Olsen hevur málningaframsýning**
í Bátafelagnum á Bakka, Niðri á Støð, Glyvrar

**21:00-22:00** **Konsert v/ Anne Linnet** Løkshøll, Runavík

**20:00** • **Føroyskur dansur í dansistovuni**
Funningur Eysturoyar dansifelag luttekur

## SUNNUDAGUR 1. MAI

**Kl. 12:00-18:00** • **Bóndagarðsdagar** Hanusarstova, Æðuvík

**14:00-15:00** **Barna-Sway** Løkshøll

**14:00** • **Gula Smiðja letur upp** Saltangará

**14:00-17:00** • **HoymaList letur upp** Rituvík
Listafólk sýna fram verk í Rituvík.

**14:00-17:00** • **Edith Mørkøre sýnir fram náttúruprent úr føroysku náttúruni**
Bókasavnið við Løkin, Runavík

**15:00** • **Gongutúrur í Skálafirði við frásøgufólki**
Skálafjørður Aftaná er myndaframsýning og drekkamunnur

**15:00-18:00** **Salsa workshop**
Stóri salur, skúlin í Oyndarfirði – Undirvísing á byrjanarstøði í kubanskum salsa, pardansi og rytmu. Undirvíst verður í tveir dagar, leygardag seinnapart og sunnudag seinnapart. Øll kunnu vera við, tó 16 ára aldursmark. Undirvísarar: Hanna og Ólavur Olsen. Tilmelding á olavur77@hotmail.com.

**15:00-17:00** **Afternoon tea hjá Karhild** Æðuvík

**15:00-21:00** • **Málninga- og leirlistaframsýning við Anju Hentze og Bessa Bjarnasyni**
Heiðavegur 32, Saltangará

**14:00-18:00** • **Ein siðsøgulig lýsing av Ólvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940**
Funningur

**16:00-19:00** **Fjallgonga** Bygdasavnið Forni, Glyvravegur 14, Glyvrar – ein framsýning við myndum og lutum av fjallgongu

**16:00-19:00** • **Opið hús á brandstøðini á Mann á Skála**
Skálavegur 11, Skála

**16:00-18:00** • **Hansina Iversen sýnir fram listaverk**
Glyvra kirkja

**17:00** **Heimablídni í Víkhúsunum** Víkhúsið, Oyndarfjørður Afternoon tea, við í prísinum er rundvísing og søgufrágreiðing. Tilmelding fer fram á tlf. nr tlf 50 44 19 ella vikhusini1856@gmail.com seinast 2 dagar áðrenn

**17:00-20:00** • **Jørgin Olsen hevur málningaframsýning**
í Bátafelagnum á Bakka, Niðri á Støð, Glyvrar

**20:00** • **Várkonsert við Kór Glyvra Kirkju**
Glyvra kirkja







# TÓNLEIKUR OG UNDIRHALD Í LØKSHØLL

Ókeypis

## Føroya Landsorkestur og Eysturoyar Symfoniorkestur spæla

TÝSDAGIN 26. APRÍL KL. 19:00

## Stand-Up við Ari Eldjárn – Norðurlendskt skemt á altjóða støði

HÓSDAGIN 28. APRÍL KL. 19:00-21:00

## Konsert við Frændum og Terja – við sterkastu manning

FRÍGGJADAGIN 29. APRÍL KL. 21:00

## Konsert við Anne Linnet

LEYGARDAGIN 30. APRÍL KL. 21:00

## BarnaSWAY – BarnaSWAY er ætlað børnum, men er fyri øll.

Ókeypis fyri vaksin, meðan børn gjalda fyri at sleppa inn

SUNNUDAGIN 1. MAI KL. 14:00

BROT ÚR SKRÁNNI









BROT ÚR SKRÁNNI



# TÓNLEIKUR Á BYGD OG Í BÝ

Mentanarvikan er á tremur við góðum tónleikaupplivingum!
Fylg við á visitrunavik.fo og á facebooksíðuni
Mentanarvikan í Runavíkar kommunu









# TÍTT BÓKASAVN – Bókasavnið við Løkin

Í Mentanarvikuni verður nógv spennandi á Bókasavninum – upplestur, framløgur, kappingar, tónleikaframførslur og listaframsýning. Harumframt verða vinnararnir av skrivikappingini eisini kunngjørdir!

**Vit síggjast á bókasavninum!**

Ókeypis

## Listaframsýning

Edith Mørkøre sýnir fram alla vikuna. Talan er um prentverk, har mynstur úr føroysku náttúruni eru nýtt í arbeiðinum. **Fernisering verður mánadagin 25. apríl** kl. 17.00.

**UPPLATINGARTÍÐIR FYRI FRAMSÝNINGINA ERU:**
13.00-18.00; MÁNADAG 25. APRÍL – SUNNUDAG 1. MAI

## Bókaframløgur, rithøvundaprát og upplestur

Sunnukvøldið 24. apríl kl. 19.30 er áhugavert rithøvundaprát og upplestur. Eilen Anthoniussen tosar við Rannvá H. Mortensen og Lív Maria Róadóttir Jæger.

SUNNUKVØLDIÐ 24. APRÍL KL. 19:30

Hóskvøldið 28. apríl er bókaframløga við Martini Næs. Í nýggju bókini **Opera men eingin olja** er eitt úrval av greinum, sum rithøvundurin hevur skrivað í tíðarskeiðnum frá 1996–2021.

HÓSKVØLDIÐ 28. APRÍL KL. 19:30

BROT ÚR SKRÁNNI







Vit hava borðspøl, ið tit kunnu spælast á bókasavninum, ella lænast heim við. Ókeypis kaffi og te er altíð á kannuni :-)

## Vinnarar av ársins skrivikapping verða kunngjørdir

Aftur í ár varð skipað fyri stórari skrivikapping í Mentanarvikuni. Hesaferð var talan um eina kapping í at skriva essay – nevnd ritroynd á føroyskum, og evnið var púra frítt.

Mánadagin 25. apríl kl. 19.30 verða vinnararnir kunngjørdir. Lena Anderssen fer at spæla tónleik á tiltakinum.

MÁNADAGIN 25. APRÍL KL. 19:30

## Tónleikur

Fríggjadagin 29. apríl kl. 15 framføra næmingar úr Nes Sóknar Musikkskúla.

FRÍGGJADAGIN 29. APRÍL KL. 15:00



**Pisst...** Upplatingartíðir uttanfyri Mentanarvikuna

Bókasavnið við Løkin er opið yrkadagar frá kl. 13-18 og leygardag frá kl. 10-14. Bókasavnið á Skála er opið mánadagar frá kl. 17-19.

BROT ÚR SKRÁNNI









BROT ÚR SKRÁNNI

# VÆLGAGNIST

Á Mentanarvikuni hava tit møguleika at royna nakrar av smáu hugnaligu støkk upp kaffistovunum, ymsar matstovur og heimablídni.

MUNGA EFTIR EINUM KAFFIMUNNI OG KØKU

- Afternoon tea hjá Karhild í Æðuvík
- Nónte í Glyvralon Tilmelding krevst
- Ølvustova í Funningi (vitja eina siðsøguliga lýsing av Ølvustovu í tíðarskeiðnum 1900-1940)
- Café á Hotel Runavík - Vit lata dyrnar upp í nýumvaldu hølunum

ERU SVONG

- Brunsj hjá Karhild í Æðuvík
- Støkk upp café — Urtahavin, Saltangará (Við livandi tónleiki og pub quiz')
- Støkk upp café v/Leivi Ejdesgaard, Oyndarfjørður

ERU GORHUNGRAÐ

- Heimablídni í Víkhúsunum, Oyndarfjørður. Tilmelding krevst
- Café Cibo í Saltangará
- Garðahúsið í Søldarfirði
- Hansusarstova í Æðuvík
- Matstovan á Hotel Runavík

KAFFIKRÓKAR OG SKUNDVERÐUR

— les meira á visitrunavik.fo

Kunning um upplatingartíðir, tilmelding og matskráir er at finna á **www.visitrunavik.fo** og á facebooksíðuni Mentanarvikan í Runavíkar kommunu

# OPEN BY NIGHT

## FRÍGGJADAGIN 29. APRÍL ER HANDILSLÍVIÐ OPIÐ TIL Á MIÐNÁTT

Handlarnir eru á tremur við góðum tilboðum, kappingum, verkstovum, tónleiki og upplivingum







**FERNISERINGIN HJÁ HANSINU IVERSEN ER STARTSKOTIÐ** til ymsu listaframsýningarnar, sum verða í kommununi. Tað, sum eyðkennir Listameldur hesaferð, er ein meldur av ungum spírum saman við viðurkendum listafólki. Útrykkið spennir víða, og innihaldið er fjølbroytt. HoymaList eru Støkk-upp framsýningar heima hjá fólki í Rituvík. Ein øðrvísi og avbjóðandi háttur at uppliva eina framsýning.

*Hjartaliga vælkomin.*

Á heimasíðuni **visitrunavik.fo** finnir tú nærri kunning um upplatingartíðir.

Ókeypis

BROT ÚR SKRÁNNI












**visitrunavik.fo**









## LISTAMELDUR

**HANSINA IVERSEN**
Glyvra kirkju

**FINNLEIF MORTENSEN**
HoymaList í Rituvík

**ÓLI P**
Kahyttin, Skála

**RANNVÁ D. CARLSSON**
HoymaList í Rituvík

**TÓRMÓÐUR DJURHUUS**
HoymaList í Rituvík

**BESSI BJARNASON**
Heiðavegur, Saltangará

**ANJA HENTZE**
Heiðavegur, Saltangará

**JØRGIN OLSEN**
Bátafelagið á Bakka, Glyvrar

**EDITH MØRKØRE**
Bókasavnið við Løkin, Runavík

**BARBARA HILDUBERG OG NÆMINGAR**
Frítíðarskúlin í Rituvík

# EG SJÓLÍVIÐ VALDI

Týskvøldið hin 26. apríl heldur Tórbjørn Jacobsen fyrilestur í húsunum hjá Fornminnafelagnum á Skála undir heitinum: „Eg sjólívið valdi.“ Sjálvur sigur hann, at tað kanska er ein spurningur hvør ið valdi hvønn. Um hann valdi havið ella øvut. Nakrar dagar eftir skírnina í Marstal kirkju í 1956 legði hann saman við foreldrunum til havs á ferjukjøli á veg til Føroyar. Síðan hevur hann reikað kring um heimin sum dekkari og skipari og hevur í so máta verið til skips í á leið 30 ár, og hevur annars havt mangt og mikið við maritimt umhvørvi at gera stóran part av lívinum m.a. sum havnarmeistari við Runavíkar havn.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer núverandi borgarstjórin í Runavíkar kommunu at hugleiða alment um hendan partin av einum annars – fyri hansara viðkomandi - hendingaríkum lívi.

Felagssangur og ein góður drekkamunnur er eisini á skránni.

***Kostnaður: 50 kr.***

TÝSKVØLDIÐ 26. APRÍL KL. 19:00

FORNMINNAFELAGIÐ FYRI SKÁLA
OG SKÁLAFJØRÐ, SKÁLA





# VIT ERU MÁLIÐ – ORÐASKIFTI

## • HVAT SIGUR UNGDÓMURIN?

Støðan hjá móðurmálinum skal stútt og støðugt eygleiðast, viðgerast og handfarast av øllum teimum, sum eiga málið – móðurmálið.

Í mentanarvikuni seta vit móðurmálið á breddan, ella undir lupp. Vit spyrja um týdningin, sum málið hevur fyri okkara samleika.

Øll vit, sum eiga málið, hava vit skyldu at røkja og menna tað? Og - skulu vit varðveita málið!

Hjartaliga vælkomin í Løkshøll til eitt orðaskifti um móðurmálið og góðan føroyskan tónleik.

**MIKUDAG 27. APRÍL KL. 19:00-21.00**

**LØKSHØLL**

**Fuglar láta, seyður jarmar og kýr belja.** Flestu livandi verur hava tørv á at samskifta. Tað hava vit menniskju eisini. Vit eiga øll at skifta orð um støðu málsins frá tíð til aðra – tí vit eru málið og øvut.

Ókeypis








BROT ÚR SKRÁNNI
















# LISTABUSSURIN VITJAR BYGD OG BÝ

**Listafólkini Rafael og Ingun elska barnalist og gleða seg at vitja børn og barnsligar sálir við spennandi listabussinum.**

| | |
|---|---|
| Søldarfjørð (barnagarðin) | kl. 11:00 |
| Oyndarfjørð (skúlan og barnagarðin) | kl. 12:00 |
| Skála (skúlan og barnagarðin) | kl. 13:00 |
| Rituvík (frítíðarskúlin) | kl. 14:00 |
| Æðuvík | kl. 14:45 |
| Runavík (Bókasavnið við Løkin) | kl. 15:30 |
| Lamba (fjósið) | kl. 16:15 |
| Funningsfjørð (bygdahúsið) | kl. 17:00 |

HÓSDAGIN 28. APRÍL KL. 11:00-17:00

RUNAVÍKAR KOMMUNA

Ókeypis



BROT ÚR SKRÁNNI





# Til børn og barnsligar sálir





# KROSSORÐAGÁTA

www.bergur.net

©bergur.net 2022

LÍVSSEIG BLÓMA, IÐ VEKSUR ALT ÁRIÐ | ETINGIN | SESSUR Í BÁTI | SILVUR | TOLULIG | GJØRDU ÓÐAR | ANGRA / TÓNI | RÚGVISMIKIL | GRIKSK OYGGJ | LISTAMAÐUR / 1001 | NIÐURSETUBYGD, IÐ ER FRÁ 1873 | TROKAR / DÝR

BYGD, IÐ ER VESTARUMEGIN FJARÐARÁ | 9 | FÚRSTADØMI / SÓLGUDUR

SLINTRA / NEVNIST | EYÐKENNI / FJASA | SLAG AV ØLI / NAVN

Í STØRRI MUN | SKYLDFÓLK / FINGUSÆR | KVØLD / TVØRSTONGIN | FÆR SÆR / VASKI

PARTUR AV NEYTAKROPPI | 1 | 2 EINS / TIN | 10 | ÓÐUR | 2 | STRÍDDIST

BINDIORÐ | 4 | FÁ TÆR / NÓG MIKIÐ | VARPAÐ ÚT | KÆRLEIKI / SPARA | RAK / SJÁLDSOM | MIKIL

SØGN UM GANDAÐI VÍKINGASKIP | 5 | 2 EINS / HYGG Í BÓK | NEI ÁLVARA / OG ANNAÐ MEIR

TVØRTRÆ / LITAVA | NAVN / INDONESIA | AMBOÐ / STRÍÐ | 3 | SÝTA / SAMEINDU TJÓÐIR

FUGLARNIR / TEKNIAMBOÐ | BÚSTAÐUR | ILL | 8

7 | PASSI | STYRKI | 6

Loys krossorðagátuna og ver við í kappingini um eitt gávukort virði 1.500 kr frá Føroya Tele.

Finn loyniorðið í talmerktu rútunum og lat síðuna inn í Visit Runavík, Heiðavegur 13, Saltangará.
Set navn og telefonnr. á seðilin. Vit kasta lut mánadagin **2**. mai 2022.

Navn: ______________________ Telefon: ______________

Loyniorð: ______________________________

**Dagføringar** Skráin verður javnan dagførd á www.visitrunavik.fo og eisini á Facebook: Mentanarvikan í Runavíkar kommunu.

Svanemærket prentsmiðja 541-894

Estra

Vásti

Visit Runavík

RUNAVÍKAR KOMMUNA